Kommunufelagið

VINNUMÁLARÁÐIÐ
TINGANES
POSTBOX 377
110 TÓRSHAVN

Dagfesting
15 februar 2016

Okkara j.nr.
16/00834-2

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j.nr. 16/00063

**Viðv. løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um matvørur**

Kommunufelagið móttók uppskot til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um matvørur v.m. til hoyringar frá Vinnumálaráðnum 29. januar.

Uppskotið loyvir landsstýrismanninum at áseta reglur um treytirnar fyri slátur av djórum frá egnum virki og sølu til brúkarann, antin beinleiðis ella í smásølu. Umframt, kann hann gera reglur um marknaðarføring hjá framleiðaranum.

Talan er sostatt um, at liberalisera matvørulógina soleiðis, at tað fer at bera til at selja siðbundan føroyskan mat, sum ikki er virkaður á løggildum matvøruvirki, í matvøruhandlum og við torgsølu. Tær siðbundnu matvørur, sum sjálv lógarbroytingin viðvíkur, eru seyða- og neytakjøt. Spurningurin er so hví broytingin ikki eisini fevnir um aðrar vørur, sum mugu teljast at vera siðbundin føroyskur matur. Í øðrum londum verður tað sætt sum ein vinnuvegur og møgulieki at selja lokalan mat/"Local Food". Tað er umráðandi at vit í Føroyum hava eina matvøru-lóggávu, sum ikki forðar fyri – men eggjar til – eina markanta víðkan av lokalari framleiðslu.

Tá nú farið er undir broytingar í matvørulógini, vilja vit nýta høvi til at taka upp ásetingarnar um veiting av drekkivatni, og krøvini um løggilding av vatnveitingarskipanum. Tað, at javnseta allar skipanir uttan mun til um talan er um veiting til húsarhald ella matvøruframleiðslu, tykist óneyðug byrða á tær kommunur og teirra vatnveitingarskipanir,

um tað ikki er talan um matvøruframleiðslu. Sum víst verður til í viðmerkingunum Vinnumálaráðsins til broytingaruppskotið:

“Galdandi matvørulóg er í samsvari við ta lóggávu, sum er galdandi í ES, men hetta er fyrst og fremst grundað á, at samsvarandi matvørulóggáva ger tað lættari at útflyta føroyskan fisk og fiskavørur til ES. Tað er ikki eitt ES-krav, at matvørulóggávan er tann sama, og føroyski heimamarknaðurin kann tí í útgangsstøði skipast soleiðis, sum føroyskir myndugleikar halda vera rættast í mun til serføroysk viðurskifti”,

Kommunufelagið heitir á Vinnumálaráðið at taka upp trupulleikarnar sum kommunurnar dragast við í samband við kunngerðina um veiting av drekkivatni. Vit eru til reiðar at samstarva um hesi viðurskifti.

Vegna
Kommunufelagið

Heðin Mortensen
Formaður

Eyðun Christiansen
Stjóri

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo